Tónleikurin og skúlin í menning

Í hesum tí›um ver›ur nógv tosa› um, hvussu vit fáa ment okkum sum tjó›, og sum heild ver›ur nógv tosa› um menning í okkara landi. Bæ›i politiskt, ítróttarliga, tónlistarliga, mentunarliga o.s.fr.

Eitt er heilt víst, og ta› er, at bæ›i tónlistarliga og mentunarliga eru vit í framgongd. Hóast ta› í hesum døgum ikki er nógv skil á fólkaskúlanum vegna verkfall, so er skúlin, sum kemur undir ta› mentunarliga, heilt víst í menning. N‡tt tilfar og n‡ggj tiltøk eru í hópatali at síggja í skúlunum, og er hetta at frøast yvir. Evnisvikur, stórar sjálvstø›ugar uppgávur, starvsvenjingar o.s.fr. er naka› av tí, sum er komi› meir og meir til sjóndar í teimum n‡ggju tí›unum. Handilsskúlin í Havn skipar fyri einum tiltaki, sum er ógvuliga áhugavert og ø›rvísi. Hetta tiltak gevur næmingunum møguleika at stovna og røkja egi› virki. Fleiri næmingar hava kappast um at havt besta virki› og framleitt bestu vøru, og ein vinnari er eisini funnin, sum skal til Danmarkar at royna seg ímóti ø›rum líknandi virkjum. F‡ra dreingir manna ta› virki›, sum gjørdist vinnari í Føroyum. Hetta er eitt sera gott dømi um, at skúlin er í menning, tí fyri nøkrum árum sí›ani høvdu føroyskir næmingar ikki møguleikan at royna slíkt. Í dag hava vit havt eitt prát vi› teir, sum vóru í vinnandi virkinum, og spurgt teir, hvat hetta er fyri naka›, hvussu teimum dámar, hví teir skulu til Danmarkar, o.s.fr.

Sum nevnt er tónleikurin eisini í menning, og ta› vantar líti› á, at onkur ungur evnaríkur føroyingur fær sítt gjøgnumbrot í útlandinum. Fleiri føroyskir einstaklingar hava serstøk tónlistarlig evnir, og sama kann sigast um tónleikabólkar. Leygarkvøldi› ver›ur í høllini á Kambsdali møguleiki at hoyra nakrar av okkara ungu tónleikarum, sum mong halda kunnu koma sera langt á tónlistarliga økinum, og enttá fáa gjøgnumbrot í útlandinum.

Ta› er ungi sangfuglur okkara Arnfrí› Lutzen, teir ungu evnaríku tónleikararnir úr bólkinum Flux, sum jú tók øll á bóli í Prix Føroyar kappingini 99, og evnaríki klaksvíksbólkurin Aria, sum skulu framføra og hava eina konsert leygarkvøldi› á Kambsdali. Vit hava í dagsins Yngd skriva um tiltaki› leygarkvøldi›, og hugt nærri at teimum sum vera at hoyra í stóru konsertini á høllini á Kambsdali.

Send inn og vinn

3 arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3'aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Yngd Sosialurin

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag